# AT SKIPA EGNA FRAMHALDSDEILD Í EYSTURKOMMUNU



*Frágreiðing frá arbeiðsbólki*

*6. mars 2024*


*Arbeiðsbólkurin:*

*Heri á Rógvi · Atli F. Johansen · Annika K. Joensen · Elisabeth Hansen*
*Eydna Lucia Nesá · Rúni Bjarkhamar · Katrin Ingolfsdóttir Gregersen · Ove Heinesen*

*„Bjóða skal eg teim kostir teir,*
*ið væl mugu eitast góðir,*
*sjálvur vil eg teir fostra upp*
*og læra teir sið og lógir“*

*Tróndur í Gøtu*

*Permumynd:*
*Søgumynd eftir Janus Kamban*
*Bronsa 1976*

# INNIHALDSYVIRLIT


Inngangur ..... 4
Hoyring og keldur ..... 4
Arbeiðssetningurin ..... 5
Støðan í dag ..... 6
Skúlastøddin ..... 8
At skipa nýggja framhaldsdeild við Gøtugjógv ..... 9
Nýggjur bygningur við Gøtugjógv ..... 9
Tørvsmeting sum grundarlag ..... 10
Trivnaðarumstøður ..... 10
Atkomuviðurskifti og framtíðartørvur ..... 10
Samanumtikið um nýggja bygging ..... 11
Skitsuuppskotið ..... 11
Umbygging av skúlanum í Fuglafirði ..... 14
Fíggjarlig viðurskifti ..... 14
Íløga í nýggjan skúlabygning ..... 15
Íløgan í at umvæla skúlan í Fuglafirði ..... 15
Kostnaðurin fyri landið ..... 15
Starvsfólkatørvur ..... 15
Samanumtikið um kostnaðin ..... 15
Læruúrtøkan og sosialir ágóðar ..... 16
Altjóða samanbering og greiningar ..... 16
Sosiali missurin ..... 16
Næmingar og fyrrverandi næmingar ..... 17
Vánaligt hugskot ..... 17
Útboðið av vallærugreinum ..... 17
Fyrimunir við egnari framhaldsdeild ..... 18
Niðurstøða ..... 19

# INNGANGUR

Býráðið í Eysturkommunu samtykti 29. september 2023 at biðja ein arbeiðsbólk gera eina frágreiðing um at skipa egna framhaldsdeild.

Arbeiðsbólkurin hevur havt eina røð av fundum, har dentur er lagdur á at hoyra viðkomandi partar og skjalfesta grundgevingarnar fyri fyrimunum ella vansum. Arbeiðsbólkurin hevur tulkað fyrimunir og vansar fyri at lýsa málið til fulnar við at greina støðuna við støði í tøkum tilfari og hoyringum. Fyrrverandi frágreiðingar eru lisnar, men arbeiðið tekur ikki støði í hesum frágreiðingum. Byrjað hevur verið av nýggjum.

Frágreiðingin er skrivað sum ein stutt og vónandi greið lýsing, har dentur er lagdur á samandrátt og niðurstøður, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt við støði í kanningararbeiðinum. Arbeiðsbólkurin hevur valt ikki at leggja meira tilfar við frágreiðingini enn nakrar tekningar.

Viðvíkjandi 10. flokki er at siga, at arbeiðsbólkurin ikki hevur tikið hetta evnið stórvegis við í arbeiðið. Mælt verður til, at hetta verður skipað í samstarvi við aðrar skúlar.

Arbeiðsbólkurin hevur, serliga við atliti at hoyringini, býtt arbeiðssetningin í tríggjar partar:

1. Hølisviðurskifti
2. Fíggjarlig og praktisk viðurskifti
3. Læruúrtøka og sosialir ágóðar

Serliga um triðja spurningin hevur nógv og gott kjak verið. Sum heild hevur verið ógvuliga trupult at finna tilfar, sum vísir á greiðar samanhangir ella enntá prógvar nøkur týðandi viðurskifti. Vit hava funnið rúgvusmiklar frágreiðingar um eitt nú PISA-kanningar og trivnaðarkanningar, uttan at tað hevur eydnast okkum at gera nakra greiða niðurstøðu. Sum dømi kann nevnast, at eingin samanhangur er millum úrslitini hjá næmingunum í 9. flokki (2022/2023) í PISA-kanningini og úrslitini hjá somu næmingum til fráfaringarroynd fólkaskúlans[1].

Eisini er vorðið greitt fyri arbeiðsbólkinum, at sterkar kenslur gera seg galdandi hjá teimum, sum vilja halda fram við verandi samstarvi. Sagt verður, at her er eingin trupulleiki at loysa, tí núverandi framhaldsdeild virkar til fulnar.

## Hoyring og keldur

Tað finst rúgvusmikið tilfar og tvær undanfarnar frágreiðingar um evnið, og hetta er gott grundarlag. Arbeiðsbólkurin hevur kortini lagt størsta dentin á at hoyra viðkomandi partar og byrjar á blonkum arki.

Tað hevur stóran týdning fyri arbeiðsbólkin at lata tørvin og áskoðanina hjá næmingunum koma so greitt fram sum gjørligt.

Arbeiðsbólkurin hevur hoyrt:

- fyrrverandi næmingar
- verandi næmingar
- umboð fyri SSP
- skúlastjóran í Tofta skúla
- lærarar og skúlastjóran í Fuglafjarðar skúla
- skúlastjóran á Skúlatrøð
- umboð fyri Undirvísingarstýrið

Harumframt hevur arbeiðsbólkurin biðið Hans Harryson, námslektara á Fróðskaparsetrinum, um eitt notat.

Vitjað hevur verið í Fuglafjarðar skúla og á Skúlatrøð í Klaksvík.

Aðrar týðandi keldur, sum eru brúktar til arbeiðið:

- PISA-frágreiðing 2018
- PISA-frágreiðing 2022
- Fólkaskúlalógin, broytingar – Tilmæli frá arbeiðsbólki, 2023
- Førleikatørvur og førleikagagn, Vakstrarforum, 2022
- Trivnaðarkanning 2023 - í fólkaskúlanum í Føroyum, Frágreiðing og tilmæli, Katrin av Kák o.o., 2023
- Innlit – eitt stórt áratíggju eftir, at fyrstu næmingarnir vórðu innskrivaðir á Skúlan við Løgmannabreyt, Hans Harryson, 2020

[1] Olsen, Erla (2022): ***PISA-frágreiðingin***, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, s. 43.



## ARBEIÐSSETNINGURIN

Hvørjir fyrimunir og vansar eru við at skipa egna framhaldsdeild?

Arbeiðsbólkurin skal í minsta lagi greina hesi øki:

- Hvussu kann ein framhaldsdeild skipast í Eysturkommunu?
- Hvørjar tillagingar skulu gerast, og hvørjir fysiskir karmar krevjast?
- Hvussu stór fíggjarlig íløga krevst?

Arbeiðið verður skipað við fundum, og arbeiðsbólkurin ger eina frágreiðing eftir tí leisti, sum arbeiðsbólkurin heldur hóska best, at leggja fyri Eysturkommunu eftir ætlan 1. mars 2024.

Viðurskifti at greina í minsta lagi:
- verandi høli, fakhøli, skúlastovur og umstøðurnar rundanum
- tillagingar av verandi hølum og umstøðum
- útbyggingar av skúlanum – hvørjir fysiskir karmar, ið krevjast
- hvørjar fakligar tillagingar, ið gerast skulu
- fyrimunir og vansar við at skipa egna framhaldsdeild

Nærri viðurskifti:
- næmingatal
- læraratoymi
- stutttíðar- og langtíðaríløgutørvur
- møguligt samstarv og tilboð viðvíkjandi 10. flokki



# STØÐAN Í DAG

Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna samstarva um 8., 9. og 10. flokk. Flokkarnir húsast í Fuglafjarðar skúla. Samstarvið virkar undir heitinum Framvit og húsast í tí sonevnda 64-skúlanum. Sáttmálin, sum varð undirskrivaður tann 11. juli í 2019, er galdandi til 2039, men kann sigast upp við trý ára varningi til endan á viðkomandi skúlaári.

Sáttmálin sigur millum annað, at framhaldsdeildin húsast í bygninginum, sum verður róptur 64-skúlin, men eisini kann nýta aðrar partar av skúlanum í Fuglafirði – felagshøli, svimjihøll, matarsal, serhøli o.a.

Sáttmálin frá 2019 sigur millum annað, at sonevndi 64-skúlin er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu, og at Fuglafjarðar kommuna hevur ábyrgdina av at halda ognirnar við líka. Allar íløgur í bygningar og undirvísingarhøli verða framdar av Fuglafjarðar kommunu, men Fuglafjarðar kommuna og Eysturkommuna bera í felag kostnaðin av framtíðaríløgum í 64-skúlan. Íløgurnar verða lutaðar millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu, soleiðis at hvør kommuna útvegar sín lutfalsliga part av íløguni við støði í næmingatalinum í kommununi í prosentum í mun til samlaða næmingatalið í báðum kommununum úr 1. upp í 9. flokk.

Á talvuni niðanfyri sæst samlaða talið á børnum frá 2008-árganginum til 2022-árgangin. Lutfalsligi parturin hjá Eysturkommunu úr 1. upp í 9. flokk er 61 %

Mynd 1

| Árgangur | Fuglafjarðar kommuna | Eystur-kommuna | Til samans | Lutfalsligur partur Eysturkommuna |
|---|---|---|---|---|
| Árgangur 2023 | 17 | 28 | 45 | 62 % |
| Árgangur 2022 | 19 | 21 | 40 | 53 % |
| Árgangur 2021 | 19 | 45 | 64 | 70 % |
| Árgangur 2020 | 23 | 37 | 60 | 62 % |
| Árgangur 2019 | 25 | 30 | 55 | 55 % |
| Árgangur 2018 | 23 | 34 | 57 | 60 % |
| Árgangur 2017 | 21 | 33 | 54 | 61 % |
| 1. flokkur 23/24 | 25 | 32 | 57 | 56 % |
| 2. flokkur 23/24 | 22 | 37 | 59 | 63 % |
| 3. flokkur 23/24 | 18 | 39 | 57 | 68 % |
| 4. flokkur 23/24 | 28 | 31 | 59 | 53 % |
| 5. flokkur 23/24 | 18 | 31 | 49 | 63 % |
| 6. flokkur 23/24 | 19 | 37 | 56 | 66 % |
| 7. flokkur 23/24 | 30 | 37 | 67 | 55 % |
| 8. flokkur 23/24 | 25 | 28 | 53 | 53 % |
| 9. flokkur 23/24 | 18 | 28 | 57 | 68 % |
| | 350 | 539 | 889 | 61 % |



Søguliga hevur næmingatalið í framhaldsdeildini í Fuglafjarðar skúla verið rættiliga støðugt. Tó er næmingatalið 174, tá ið tað er hægst í 2005/2006, og 111 í 2017/2018. Í mun til gongdina í Føroyum sum heild líkist hetta ikki burturúr. Samlaða talið á føddum børnum lutfalsliga í Fuglafirði og Eysturkommunu sveiggjar millum 6 % og 9 % hesi árini. Av tí at til ber at fara úr egnari kommunu at ganga í skúla, kann barnatalið víkja frá næmingatalinum.

Mynd 2






## Skúlastøddin

Í skrivandi stund eru 20 framhaldsdeildir í Føroyum. Í alt ganga 695 børn í 8. flokki og 727 børn í 9. flokki. Talið á børnum í 10. flokki er nakað minni – 432. 13 skúlar bjóða 10. flokk. Skúlarnir í Havn savna 10. flokk í Eysturskúlanum, og tí er hetta nógv tann størsti 10. flokkurin í landinum.

Mynd 3

| Skúli | 8. flokkur | 9. flokkur | 10. flokkur |
|---|---|---|---|
| Hvalbiar skúli | 10 | 7 | . |
| Sandoyar Meginskúli | 14 | 15 | 4 |
| Vestmanna skúli | 14 | 20 | 5 |
| Kollafjarðar skúli | 15 | 17 | . |
| Stranda skúli | 15 | 14 | 4 |
| Sørvágs skúli | 16 | 24 | 5 |
| Hoyvíkar skúli | 17 | 40 | . |
| Tvøroyrar skúli | 22 | 18 | 4 |
| Tofta skúli | 23 | 21 | 12 |
| Sankta Frans skúli | 27 | . | . |
| Vágs skúli | 27 | 20 | 18 |
| Skúlin á Giljanesi | 31 | 34 | 7 |
| Skúlin við Streymin | 37 | 36 | 12 |
| Skúlin á Argjahamri | 45 | 37 | . |
| Fuglafjarðar skúli | 50 | 55 | 42 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 51 | 53 | . |
| Eysturskúlin | 56 | 52 | 238 |
| Runavíkar Kommunuskúli | 61 | 60 | 43 |
| Á Skúlatrøð | 72 | 83 | 38 |
| Skúlin á Fløtum | 92 | 121 | . |
| Til samans | 695 | 727 | 432 |

Á næstu síðuni sæst ein mynd av samlaða næmingatalinum í nøkrum av skúlunum í Føroyum. Verður egin framhaldsdeild skipað í skúlanum í Eysturkommunu, býtir skúlin um pláss við Fuglafjarðar skúla.



Mynd 4




Eingin ivi er um, at Eysturkommuna hevur fortreytirnar fyri at hava egna framhaldsdeild. Verður sæð burtur frá Havnini, Runavík og Klaksvík, verður talan um eina av størru framhaldsdeildunum, um Eysturkommuna velur at skipa egna framhaldsdeild.

# AT SKIPA NÝGGJA FRAMHALDSDEILD VIÐ GØTUGJÓGV

Í hesum partinum hyggja vit at einum skitsuuppskoti til nýggjan bygning til framhaldsdeild við Gøtugjógv. Vit meta lítið høpi vera í at viðgera eina fyribilsloysn til at hýsa framhaldsdeild í Eysturkommunu, tá ið hugsað verður um, at ætlanir eru um at byggja um í Fuglafirði, og stórar umvælingar og nýbygging standa fyri framman í verandi skúlum í Eysturkommunu.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið tekningar og tilfar frá Teknistovuni Gøta. Kommunan hevur sett seg í samband við teknistovuna, og arbeiðsbólkurin hevur hitt umboð fyri teknistovuna tvær ferðir í sambandi við arbeiðið, umframt at nakað av samskifti hevur verið.

Arbeitt hevur verið við einum hugskoti í skitsulíki um at byggja nýggjan bygning við Gøtugjógv. Økið verður í dag brúkt til skúla, og tað verður mett at bera væl til at byggja nýggjan bygning saman við verandi bygningum á økinum, sum verður samanbygt.

## Nýggjur bygningur við Gøtugjógv

Í løtuni húsast skúlin í Eysturkommunu í Leirvík og við Gøtugjógv.

Innskúlingin við næmingum úr 0. upp í 3. flokk heldur til í Leirvík. Í næstum verður farið undir at bróta bygningarnar frá 1929 og 1962 niður og byggja tíðarhóskandi skúla á økinum.

Miðdeildin við næmingum úr 4. upp í 7. flokk heldur til við Gøtugjógv. Ein partur av skúlanum er tíðarhóskandi, men serliga partinum,

sum hýsir fakhølunum, tørvar stórar ábøtur fyri at gerast tíðarhóskandi. Hetta eru hølini, har lærugreinirnar evning, handarbeiði, smíð og tónleikur halda til í dag. Hetta er ikki við í skitsuni frá teknistovuni. Skula vit koma upp á sama stig sum tað, sum verður boðið út í Fuglafirði, eigur hetta at verða tikið við.

Í 2024 eru 139 næmingar í hvørjari deild, og sostatt ganga í dag 278 næmingar í Skúlanum í Eysturkommunu.

## Tørvsmeting sum grundarlag

Bygningurin hevur støði í eini tørvsmeting, sum bólkurin sjálvur hevur gjørt við støði í royndunum hjá limunum í bólkinum og keldutilfarinum, sum verður nevnt í innganginum. Uppskotið er ikki at meta sum ein endalig verkætlan, men talan er um eina realistiska meting. Til ber at halda fram at arbeiða við tilfarinum, ella tað kann brúkast sum grundarlag fyri fyrst og fremst eini kostnaðarmeting og fyri einari verkætlan, sum sannlíkt kann gerast til veruleika og lúka ásettu krøvini sambært tørvsmetingini.

Seks skúlastovur eru teknaðar, sum eru 65 fermetrar til støddar. Ein ávís óvissa valdar, hvørt tað verður eitt lógarkrav, at bert tjúgu næmingar skulu vera í hvørjum flokki. Av royndum meta vit hetta at vera hóskandi stødd til umleið 20 næmingar, og tað er umleið sama stødd, sum teknað verður í uppskotinum um at byggja Fuglafjarðar skúla um. Í skitsuni er ein stova til alis- og evnafrøði teknað sum einasta fakhøli. Hetta er gjørt, av tí at verandi høli til alis- og evnafrøði ikki kunnu metast at nøkta tørvin.

Tær flestu floksstovurnar eru knýttar at bólkarúmum. Tað gevur møguleikar fyri øðrvísi dynamikki í undirvísingini, og til ber at hugsa ta miðfirraðu undirvísingina inn.

Í dagsins samfelag eru fleiri næmingar, sum stríðast við eitthvørt. Skúlastjórarnir, sum vit hava tosað við, vísa á, at tá ið hesir næmingarnir koma í framhaldsdeildina, koma teirra avbjóðingar betur til sjóndar. Tørvurin á sertilboði sæst betur, og hevur tí stóran týdning, at umstøður og høli eru til at veita slíkt tilboð.

Eitt felagstorg kann vera avgerandi fyri, at skúlin gerst ein eind og fær eitt hjarta, har øll kunnu møtast til felagstiltøk. Torgið ger sítt til at skapa trivnað á skúlanum, og eisini bygdin kann fáa ágóðan av hesum hølunum, sum kunnu brúkast til ymisk tiltøk.

Hetta sæst týðiliga aftur í miðhøllini í skúlanum í Leirvík, sum javnan fær sera jaligar viðmerkingar fyri funktionalitetin.

## Trivnaðarumstøður

Eldru næmingarnir hava møguleika at vera inni í fríløtunum, og fyri at skapa trivnað á skúlanum er umráðandi við fríøkjum inni, har næmingarnir kunnu vera saman í fríløtum. Hetta setur eisini onnur krøv til innbúgvið enn hjá yngru næmingunum.

Hóast eldru næmingarnir hava møguleika at vera inni í fríløtunum, hevur tað týdning, at økið uttanum, har næmingarnir kunnu fara út at fáa sær fríska luft, verður lagað til ungdómin. Føroyska veðurlagið krevur, at umstøður eru at vera undir hálvtaki, og at næmingarnir hava útimøblar at sita í.

Tá ið næmingarnir koma í framhaldsdeildina, vísa kanningar, at nógvir teirra gevast at íðka ítrótt. Tí er umráðandi, at skapa karmar til rørslu við at hava vøll og onnur øki, har næmingarnir kunnu vera virknir.

## Atkomuviðurskifti og framtíðartørvur

Arbeiðsbólkurin hevur eisini gjørt aðrar metingar við atliti at framtíðartørvinum hjá skúlanum í Eysturkommunu, um egin framhaldsdeildin verður veruleiki.

Sum er, eru atkomuviðurskiftini ikki nøktandi. At fleiri næmingar fara at húsast í skúlanum við Gøtugjógv, fer at ávirka ferðsluna kring skúlan. Umráðandi er, at atkomuviðurskiftini verða hugsað inn í verkætlanina, so at trygt verður at seta børnini av við skúlan. Tekningarnar vísa eisini á parkeringspláss, sum tørvur er á.



At fáa ein størri skúla við framhaldsdeild krevur øðrvísi arbeiðsuppgávur av leiðsluni. Tí eiga skúlastjórin, varaskúlastjórin og skrivstovufólkið at fáa betri arbeiðsumstøður. Hjá eini framhaldsdeild er alneyðugt at hava eitt fjølbroytt bókasavn við góðum umstøðum at arbeiða í. Verandi bókasavn er ikki nøktandi.

## Samanumtikið um nýggja bygging

Strikast má staðiliga undir, at fortreytin fyri, at ætlanin eydnast, er, at kommunalu myndugleikarnir eru til reiðar at játta peningin, sum krevst til at stovna og reka eina nútímans framhaldsdeild. Umráðandi er, at kommunan bjóðar eitt tilboð, sum í minsta lagi er á sama stigi sum verandi tilboð – og helst betri.

Neyðugt verður at byggja út, soleiðis at hølisviðurskiftini nøkta dagsins tørv til skúlaskap. Her verður hugsað um:

- trivnaðarumstøður
- fakhøli
- serhøli
- klivar og bólkarúm
- økið uttanum
- felagstorg
- góð atkomuviðurskifti í sambandi við bilar og bussar

## Skitsuuppskotið

Niðanfyri og á næstu síðunum sæst skitsuuppskotið frá Teknistovuni Gøta.



| Rúmyvirlit : | Fermetrar |
|---|---|
| Skúlastovur og bólkarúm | 438 |
| Alis-og evnafrøði Serstova | 100 |
| Serstovur | 30 |
| Vesir og starvfólkarúm v.m. | 278 |
| Felags øki og goymsla | 156 |
| Durur, bókagoymsla og útveggir | 113 |
| Samlað fermetratal | 1.115 |

**Uppskot 2024 rætta**

teknistovan **GØTA**
v. Jens Klæmint Jacobsen og Henning Olsen, ráðg. byggifrøðingar, Gøtuvegur 2, FO 510 Gøta, www.teknistovan.fo

Ánari : Eysturkommuna
Mál nr. : 610
Dagfest. : 28.02 -2024 rætta 29.02.2024


Framhaldsdeild 1115 M²
kota 16
kota 20
Byggilinja LV
Byggilinja
25000
10 P-Pláss
6 P-Pláss
teknistovan GØTA
v. Jens Klæmint Jacobsen og Henning Olsen, Ráðg. byggifr.
tel. : 442344
Faks. : 442345
Far. jkj : 232343
far. ho : 232344
Húsgarður 33
510 Gøta
Skrás. 3347
V-tal 517518
www.teknistovan.fo
teknistovan@teknistovan.fo
jkj@teknistovan.fo
ho@teknistovan.fo
Ánari : Eysturkommuna
Evni : Uppskot 2024 rætta - Framhaldsdeild, STØÐUMYND
Dagfesting : 28.02 -2024
Teknað : jkj
Kannað : ho
Rætta: A: 29.02.2024
Mát : 1:500
Tekning nr : 610- U.2


NOTA.:
Framhaldsdeild 1.115 m² Uttanduðra mát
Byggilinja LV 25 m frá vegmiðju
Byggilinja
FELAGSRÚM
140 M²
Starvsfólkarúm
22 m²
Reingerð
15 m²
Dur
25 m²
43612
42515
18741
teknistovan GØTA
v. Jens Klæmint Jacobsen og Henning Olsen, Ráðg. byggifr.
Ánari : Eysturkommuna
Evni : Uppskot 2024 rætta - Framhaldsdeild, PLANTEKNING
Dagfesting : 28.02 -2024
Teknað : jkj
Kannað : ho
Rætta: A: 29.02.2024
Mát : 1:250
Tekning nr : 610- U.3

# UMBYGGING AV SKÚLANUM Í FUGLAFIRÐI

Sum áður nevnt, húsast framhaldsdeildin í Fuglafjarðar skúla í tí sonevnda 64-skúlanum, sum varð bygdur í 1964. Fuglafjarðar skúli er í alt 7.700 fermetrar til støddar.

Ítøkiligar ætlanir eru um at byggja tann partin av Fuglafjarðar skúla, sum í dag hýsir framhaldsdeildini, um. Til henda partin brúka vit tilfar frá juni 2020 og frá 2023, sum Rúni Abrahamsen hjá MAP Arkitektum hevur staðið fyri.

Skúlin í Fuglafirði hevur bygt yngru flokkunum nýggjan skúla umframt fleiri fakhøli, sum framhaldsdeildin eisini kann brúka og fáa gleði av. Hesin parturin er 3.700 fermetrar til støddar. Hetta er fyrsta byggistig. Næsta byggistig er 64-skúlin. Rúni Abrahamsen lýsir verkætlanina millum annað soleiðis:

Arkitekturin í nýggja barnaskúlinum er tillagaður arkitekturinum í 64-skúlanum, men hevur eisini søguliga tilvísing til tornið í gamla 36-skúlanum. 64-skúlin er eyðkendur við loddrættum veggjasúlum. Tað er umráðandi, at hetta sereyðkennið í byggilistini verður varðveitt, hóast útsíðurnar skulu bjálvast.

Í 64-skúlanum eru allar høvuðsrørføringar gjørdar av nýggjum á 1. byggistigi. Nýtt fýrrúm og nýggj ventilatión í svimjihøllini eru eisini gjørd í sambandi við 1. byggistig, umframt at takið á 64-skúlanum er skift.

Harumframt er eitt triðja byggistig við í kostnaðarmetingini og lýsingini. Hetta verður kallað vælverudepil, og tað inniber skiftingarrúm, barnahyl og vælveruumstøður. Hetta verður umleið 250 fermetrar.

# FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI

Eysturkommuna rindaði í 2023 Fuglafjarðar kommunu 1.923.996 krónur fyri næmingarnar, sum ganga í allari framhaldsdeildini, úr 8. upp í 10. flokk. Henda upphæddin verður mett at vaksa nakað í 2024. Upphæddin er vaksin munandi síðan 2019, tá ið nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður.

Síðan 2019 hevur gjaldið hjá Eysturkommunu verið, sum talvan niðanfyri vísir. Kostnaðurin hækkaði munandi í 2020 í mun til 2019 sambært nýggja sáttmálanum frá 11. juli 2019. Bussleiðin verður roknað við nettokostnaði. Landið endurrindar helvtina av kostnaðinum.

Mynd 5

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gjald til Framvit | 1.173.000 | 1.689.586 | 1.609.110 | 1.653.746 | 1.923.996 | 2.000.000 |
| Bussleið (netto) | 366.495 | 452.367 | 333.750 | 371.391 | 437.200 | 375.000 |
| Annað | 0 | 200.000 | 0 | 95.900 | 124.243 | 150.000 |
| Í alt | 1.539.495 | 2.341.953 | 1.942.860 | 2.121.037 | 2.485.439 | 2.525.000 |

## Íløga í nýggjan skúlabygning

Íløgan at byggja ein nýggjan bygning, sum er meinlíkur tí fyribilsteknaða skúlanum í hesari frágreiðingini, við Gøtugjógv verður mett at kosta millum 42 og 46 milliónir.

Metingin er grundað á byggikostnaðir fyri skúlan í Leirvík og tøl frá Tórshavnar kommunu, sum í løtuni byggir framhaldsdeild til Sankta Frans skúla. Metti fermetrakostnaðurin er 37.132 kr. Hetta er fyri allar byggiútreiðslur, tá ið tilfar, møblar, útgerð og meirvirðisgjald eru íroknað. Tað kann gerast neyðugt at byggja nýtt teknikkrúm ella kjallara, og tí verður kostnaðarmetingin søgd at vera millum 42 og 46 milliónir.

## Íløgan í at umvæla skúlan í Fuglafirði

Sum nevnt í lýsingini av verandi støðu, skal Eysturkommuna sambært galdandi sáttmála rinda fyri góð 60 % av framtíðaríløgum í 64-skúlan. Fyrsta kostnaðarmetingin fyri annað og triðja byggistig var 54 milliónir í 2020. Verður hetta framroknað við 18,5 % í kostnaðarhækkingum, og verður lutfallið 61 % brúkt, verður parturin hjá Eysturkommunu góðar 39 milliónir.

## Kostnaðurin fyri landið

Fólkaskúlin er sum heild soleiðis skipaður, at landið ber kostnaðin av lærarum og námsfrøðingum, og kommunurnar rinda fyri bygningar, tilfar og annað.

Teir smæstu skúlarnir eru nógv dýrastir fyri hvønn næming. Sum sæst á yvirlitinum aðrastaðni í frágreiðingini, teljast Skúlin í Eysturkommunu og Fuglafjarðar skúli millum teir størru skúlarnar í landinum.

Metingin hjá Undirvísingarstýrinum er, at um sjey ársverk skulu setast afturat í skúlanum í Eysturkommunu, og talið av ársverkum fer at minka í Fuglafjarðar skúla. Tá ið talan er um ein meirkostnað fyri landið, so kemst hesin (meirkostnaðurin) av háttinum hjá landinum at játta pening til tímar.

Undirvísingarstýrið vísir á, at framhaldsdeildin í Eysturkommunu kann gerast viðbrekin, tí næmingatølini skulu ikki sveiggja serliga nógv, áðrenn komið verður niður at einum kritiskum punkti, um talan verður um eitt ella tvey spor. Sostatt kann skúlin gerast ein sveiggiskúli. Undirvísingarstýrið hevur simulerað tølini og vísir á, at var núverandi 8. flokkur ikki farin til Fuglafjarðar, hevði hann helst havt 27 næmingar. Kritiska talið er 26 næmingar, ið gevur ein flokk. Sostatt kann skúlin gerast eitt sindur útsettur við játtanarskipanini, ið vit hava í dag.

## Starvsfólkatørvur

Sum nevnt omanfyri, fer skúlanum í Eysturkommunu at tørva fleiri starvsfólk, verður framhaldsdeild skipað í kommununi. Tað stendur skúlaleiðsluni frítt at seta teir umsøkjarar, sum hon metir at vera best skikkaðar. Lærarar í Fuglafjarðar skúla kunnu søkja á jøvnum føti við øll onnur.

## Samanumtikið um kostnaðin

Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at tað skapar Eysturkommunu nakran meirkostnað av týdningi at skipa egna framhaldsdeild til árligan rakstur. At skipa nýggja framhaldsdeild hevur hinvegin øktan kostnað við sær fyri landið. Metti kostnaðurin er um eina millión um árið.

Metingin av íløgukostnaðinum er í hesari frágreiðingini nakað hægri, um hon verður gjørd í Eysturkommunu, enn um hon verður gjørd í Fuglafirði. Men talan er um metingar, sum skulu kannast nærri.

# LÆRUÚRTØKAN OG SOSIALIR ÁGÓÐAR

## Altjóða samanbering og greiningar

Bólkurin hevur leitað sær vitan hjá Hans Harryson, Ph.d. og námslektara í undirvísing og læring. Hetta næsta brotið er grundað á eitt notat, sum Hans Harryson hevur sent bólkinum eftir umbøn.

Millum annað leggur hann dent á, at nýggjar kanningar úr føroyska fólkaskúlanum vísa, at næmingatalið „í sjálvum sær" ikki sær út til at hava stórvegis ávirkan á samlaðu læruúrtøkuna hjá næmingunum . Tað, sum hevur ávirkan, er hinvegin

(1) útbúgvingarstigið hjá foreldrunum og

(2) dygdin á undirvísingini, sum verður skipað í einstaka skúlanum.

Tað er trupult at greina, hvønn týdning skúlastødd hevur í Føroyum. Granskingin úr øðrum londum fevnir í stóran mun um skúlar, sum eru størri enn flestu skúlar í Føroyum. Tí ber illa til at flyta granskingarúrslit úr øðrum londum til Føroya. Kaga vit kortini í niðurstøðurnar, síggja vit, at altjóða skúlagranskarar siga, at í einum miðalstórum skúla ganga millum 600 og 900 næmingar.

Verður støði tikið í PISA-kanningini, so vísa kanningar,

- at næmingar, sum ganga í skúlum, sum telja um 1000 næmingar, sum heild fáa meira burtur úr undirvísingini enn javnaldrarnir, sum ganga í annaðhvørt størri ella minni skúlum[2], og
- at næmingar, sum ganga í flokkum, sum telja millum 21 og 23 næmingar, sum heild fáa meira á skaftið enn næmingar, sum ganga í annaðhvørt størri ella minni flokkum[3].

Fyrimunirnir við einum „stórum skúla" eru ofta, at til ber at nýta lærararakreftirnar skilabetur. Lærararnir sleppa at undirvísa í sínum linjulærugreinum, teir undirvísa í færri lærugreinum, og teir hava fleiri starvsfelagar at luta royndir og hugskot við.

Vansarnir við einum „stórum skúla" eru, at tann einstaki lærarin kann hvørva í fjøldini, og at arbeiðsplássið kann kennast honum ópersónligt.

## Sosiali missurin

Nógv tað mest kensluborna, og helst eisini trupla evnið at greina hjá bólkinum hevur verið parturin um sosiala missin, velur Eysturkommuna at skipa egna framhaldsdeild.

Tað er púra greitt, at tey, sum ikki taka undir við at skipa egna framhaldsdeild í Eysturkommunu, hava sosiala missin sum allarfremstu grundgeving. Satt at siga halda fleiri teirra, sum bólkurin hevur tosað við, tankan um egna framhaldsdeild vera púra skilaleysan.

Tað er heilt einfalt ein stórur fyrimunur at koma saman við øðrum ungum. Tað er ein sterkur felagsskapur, sum ríkar næmingarnar og ger tað stuttligari og hugaligari at ganga í skúla, vilja bæði Vagn Foldbo og lærarar úr Fuglafjarðar skúla vera við.

[2] Harryson, Hans (2020): ***Innlit – eitt stórt áratíggju eftir, at fyrstu næmingarnir vórðu innskrivaðir á Skúlan við Løgmannabreyt***, Undirvísingarstýrið og Tórshavnar kommuna, s. 85.

[3] Olsen, Erla (2022): ***PISA-frágreiðingin***, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, s. 6.

[4] Egelund, Niels (2006): ***Den gode undervisning: Hvad kan PISA egentlig sige om praksis?, Andersen, P. (ritstj.), God undervisning,*** Unge pædagoger, s. 109.

[5] Borland, M. Et al. (2005): **An investigation of the effect of class size on student academic achievement**, Education Economics, 13:1, s. 78.



## Næmingar og fyrrverandi næmingar

Næmingarnir sjálvir siga sum heild, at felagsskapurin millum næmingarnar hevur stóran týdning. Tey fingu nýggjar vinir, og tað varð lættari at finna saman við øðrum við somu áhugamálum. Hjá teimum var ikki so umráðandi, hvar ið framhaldsdeildin var. Tey høvdu onga avgjørda støðu tí viðvíkjandi.

Tey í Fuglafirði kundu eins væl koma til Gøtu at ganga í framhaldsdeild. Tey saknaðu sumt, eitt nú lærarar og vallærugreinir, sum tey kendu úr Gøtu, og hildu, at ein framhaldsdeild væl kundi borið til í Gøtu.

Eldru børnini vístu á, at tey høvdu havt eina góða tíð í Fuglafirði, serliga í 10. flokki. Sangleikurin varð nevndur sum nakað serstakliga jaligt og gevandi. Tey vístu á, at umhvørvið bæði í og uttan fyri skúlan var gott. Stórar umbyggingar fóru fram, meðan tey gingu í framhaldsdeildini. Tað kundi viðhvørt vera ein avbjóðing, men sum heild hevði tað ikki stóra ávirkan á teirra trivnað. Umstøðurnar í Fuglafirði vórðu sum heild hildnar at vera góðar, og tað var hugaligt at vera í einum virknum býi. Onkur segði seg hava dámt ógvuliga væl í Fuglafirði og fingið nýggjar vinir..

Tey hildu, at ein framhaldsdeild væl kundi verið í Gøtu.

## Vánaligt hugskot

Lærararnir í Fuglafjarðar skúla vísa á, at skúlin hevur sterkar førleikar og eina mentan at hava framhaldsdeild við góðum úrslitum. Tað var eingin ivi í teirra hugaheimi, at hugskotið um egna framhaldsdeild í Eysturkommunu er vánaligt. Skúlin í Fuglafirði hevur í áratíggju bygt upp eina vælvirkandi framhaldsdeild, sum tey onga grund síggja til at skula pilka sundur, tá lagt verður upp til samstarv.

Lærararnir í Fuglafirði vístu eisini á, at tað fyri summi børn kann vera sera jaligt at fá eina nýggja byrjan við nýggjum lærarum og umhvørvi. Eisini vóru lærararnir bangnir fyri, at vallærugreinarnar fóru at minka, um Eysturkommuna tók seg úr samstarvinum. Eitt nú varð sagt, at tær kreativu lærugreinarnar kundu verða við til at skapa trivnað millum teir næmingarnar, sum ikki vóru so bókligir. Hetta kundi hava við sær, at tað bókliga eisini styrkist, tá ið trivnaðurin gerst betri.

Eitt nú vísir SSP á, at skiftið úr einum skúla í annan og í nýtt umhvørvi í aldrinum, sum børnini í 8. flokki eru í, er sunt og aloftast mennandi.

Fleiri partar vísa á, at næmingar í munandi størri mun finna saman við øðrum líkum. Hetta skal skiljast soleiðis, at tey sosialt kunnu finna onnur, sum tey hóska betur saman við. Víst verður eisini á, at møguleikin at gera sína ávirkan galdandi, tá ið ræður um, hvørjum tú kemur í flokk saman við, hevur stóran týdning fyri næmingarnar sjálvar.

Tí verður tosað um sosialan miss. Hetta hoyrist frá at kalla øllum pørtum, sum kenna til samanrenningina millum børn úr Gøtu og Leirvík og børn úr Fuglafirði í felags framhaldsdeild.

Hinvegin hevur arbeiðsbólkurin eingi skjalprógv fyri, at sosiali parturin hevur økta læruúrtøku við sær, hóast nógv halda slíkan samanhang vera ógvuliga sannlíkan.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki fingið til vegar tøl, sum prógva, at ein størri framhaldsdeild, har Fuglafjørður og Eysturkommuna eru saman, gevur betri próvtøl ella læruúrtøku – heldur ikki øvut.

## Útboðið av vallærugreinum

Kanningarnar hjá bólkinum hava víst, at tað er avmarkað, hvørjar aðrar lærugreinir enn alisog evnafrøði og týskt gerast veruleiki. Hoyringin hevur víst, at vallærugreinirnar, sum verða valdar, ofta hava samband við, hvat ið næmingurin ætlar sær eftir loknan fólkaskúla. Sum heild varð víst á, at tað er umráðandi ikki at gloyma vanligu lærugreinarnar. Tær fylla hóast alt mest í skúladegnum. Hetta nevndu bæði næmingar og onkur skúlaleiðari í sambandi við hoyringina.

## Fyrimunir við egnari framhaldsdeild

Sum nevnt fleiri ferðir áður, finnast – eftir okkara bestu meting – eingi greið granskingarúrslit, sum tala fyri eini loysn heldur enn eini aðrari í hesum førinum. Tí verður tað ein politisk vigan av fyrimunum og vansum, sum verður avgerandi.

Eingi tekin, hvørki so ella so, eru um, at verandi skipan við felags framhaldsdeild ikki gevur munagóð úrslit, ella at hon hevur munandi brek av nøkrum slag. Fleiri vísa á, at hølisviðurskiftum tørvar ábøtur, og tað er viðgjørt í øðrum pørtum av hesari frágreiðingini.

Uppgávan er eisini at greina fyrimunirnar. Til hetta hevur arbeiðsbólkurin brúkt hoyringina og tilfarið, sum er tøkt. Mett verður, at tá ið næmingarnir ganga í sama skúla úr 1. upp í 9. flokk, skapar hetta ein samleika sosialt og mentanarliga og eisini viðvíkjandi góðari læruúrtøku. Kunnleikin um einstaka næmingin verður styrktur munandi, tá ið skúlin kann fylgja næmingum úr Skúlaspíranum til loknan fólkaskúla.

Tað kann hava eyðsæddar fyrimunir við sær fyri skúlan í Eysturkommunu at fáa fleiri flokkar at undirvísa og øktan starvsfólkahóp. Tað, at skúlin veksur, ger, at fleiri læraraførleikar vera í skúlanum. Tað styrkir skúlan, at lærarar við ymiskum førleikum eru í skúlanum. Teir fáa arbeitt í toymum og øðrum samstarvi.

Fakliga umhvørvið millum lærararnar í framhaldsdeildini kann lyfta skúlan. Atdráttarmegin við einari framhaldsdeild kann gera kynsbýtið millum starvsfólk javnari, og tað gevur næmingunum fleiri fyrimyndir.

At næmingar ikki skifta lærarar ov ofta, er ein jalig avleiðing av, at teir eru í sama skúla. Samskiftið og samstarvið millum skúla og heim verður styrkt í heimliga umhvørvinum. Hetta legði SSP millum annað dent á.





# NIÐURSTØÐA

Tað ber til. Arbeiðsbólkurin, sum er settur at greina skipan av egnari framhaldsdeild í Eysturkommunu, metir einki teknist at vera til hindurs fyri, at Eysturkommuna skipar egna framhaldsdeild. Eysturkommuna hevur góðar fortreytir fyri at skipa egna framhaldsdeild, og eingin grundgeving er funnin fyri, at tað ikki ber til.

Kanningararbeiðið hjá bólkinum hevur greitt víst, at sosiali parturin við at koma saman við øðrum á eini størri framhaldsdeild hevur stóran týdning. Starvsfólk og næmingar hava víst á, at tá ið tú kemur í nýggja umhvørvið, skapar hetta ein nýggjan og gevandi felagsskap. Hetta verður størsti missurin, velur Eysturkommuna at skipa egna framhaldsdeild. Heldur ikki eru nøkur tekin funnin um, at verandi framhaldsdeild ikki virkar til fulnar.

Útboðið av vallærugreinum verður ikki stórvegis ávirkað av, at egin framhaldsdeild verður skipað. Royndir hjá øðrum skúlum vísa, at talið á vallærugreinum, sum næmingarnir velja, avmarkar seg til ávísar lærugreinir.

Støddin á eini nýggjari framhaldsdeild forðar ikki fyri øktari ella somu læruúrtøku. Størri skúlar hava eyðsæddar fyrimunir, tá ið ræður um at leggja arbeiðið til rættis, men gransking vísir, at tað fyrst og fremst er góðskan á einstøku undirvísingini, sum skapar økta læruúrtøku.

Árligi fíggjarligi meirkostnaðurin fyri Eysturkommunu er lítil fyri hvønn næmingin. Fyri landið verður hinvegin talan um ein árligan meirkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið eitt skitsuuppskot um nýggjan bygning til framhaldsdeild við Gøtugjógv. Kostnaðarmetingin er 42-46 milliónir.

Strikast má staðiliga undir, at fortreytin fyri, at ætlanin eydnast, er, at Eysturkommuna er til reiðar játta peningin, sum krevst til at stovna og reka eina nútímans framhaldsdeild. Umráðandi er, at kommunan bjóðar eitt tilboð, sum í minsta lagi er á sama stigi sum verandi tilboð – og helst betri.

Neyðugt verður at byggja út, so at hølisviðurskiftini nøkta dagsins tørv til skúlaskap. Her verður hugsað um:

- trivnaðarumstøður
- fakhøli
- serhøli
- klivar og bólkarúm
- økið uttanum
- felagstorg
- góð atkomuviðurskifti í sambandi við bilar og bussar

Arbeiðsbólkurin heitir staðiliga á Eysturkommunu um at taka endaliga støðu til spurningin. Ivin um framtíðina skapar órógv í samfelagnum og hjá næmingum og starvsfólki.



estra VASTI